

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 04 - 2012

# Kina vil hava fótafesti í Arktis

Seinni í hesum mánaðinum fer kinesiski forsætisráðharrin, Wen Jiabao, at vitja í Týsklandi og Póllandi, men nú hann er á okkara leiðum, hevur hann valt at leggja leiðina til Svøríkis og Íslands eisini. Tað er ikki av tilvild, at kinesiski stjórnarleiðarin fer til tvey av londunum, sum liggja við tann norðara pólkringin. Song Tao, varauttanríkisráðharri, ásannar, at Kina vil fegið hava eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum. -Vit vóna at fáa samarbeiði við viðkomandi lond, teirra millum Ísland og Svøríki, so vit kunnu samstarva um frið, støðug viðurskifti og eina burðardygga menning í Arktis, sigur Song við tíðindafólk. Hann leggur afturat, at Kina hevur longu fingið stuðul frá svium um at fáa eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum. Noreg ivast Danmark og Grønland eru eisini jalig yvir fyri kinesiska ynskinum um eygleiðarastøðu í ráðnum. Hinvegin er norska stjórnin ikki so hugað fyri hugskotinum, men viðurskiftini millum tey bæði londini hava ikki verið tey bestu, síðani norska Nobel-nevndin valdi at geva kinesiska samfelagsrevsaranum liu Xiaobo friðarheiðurslønina. Í Íslandi fer Wen Jiabao at kanna møguleikarnar fyri samstarvi við íslendingar um geotermiska orku og gransking innan norðlýsi, og í Svøríki fer hann væntandi at skriva undir eina avtalu um eina burðardygga ídnaðarverkætlan. Áhugin hjá Kina fyri tí arktiska økinum er vaksin, so hvørt sum ísurin í póløkinum er minkaður, og Kina vil fegið hava ein týðandi leiklut í økinum, nú tann minkandi ísurin letur upp møguleikar fyri størri skipaferðslu.